Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Aksel V. Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Árni Skaale, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Framleiðsla av svartkjafti til matna

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um, at størri partur av svartkjaftinum verður landaður til matna í framtíðini?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta krøv til vinnuna um, at ein partur av svartkjaftinum skal landast til matna?
3. Um so er, at landsstýrismaðurin ikki hevur neyðugu lógarheimildina til at krevja, at ein partur skal landast til matna, hevur landsstýrismaðurin so ætlanir um fáa heimildina til vega?

Viðmerkingar:
Vakstrarforum legði síni tilmæli fram fyrr í summar. Eitt av tilmælunum hjá Vakstrarforum er, at útflutningsvirðið á okkara sjófeingi skal vaksa í minsta lagi við eini helvt fram til 2030.

Sambært Vakstrarforum skal hetta millum annað gerast við munandi meira virðisøking av tilfeinginum enn í dag. Tað vil siga, at nógv meira skal fáast burtur úr hvørjum kilo av rávøru.

Eitt av tilmælunum er, at politiska skipanin skipar karmar fyri javna rávørutilgongd hjá nýggjum hugskotum og virkjum á landi.

Í dag verður partur av okkara uppisjóvarfiski landaður til ídnað. Hetta ger seg ikki minst galdandi fyri svartkjaftin, har nærum øll veiðan verður landað til Havsbrún og brúkt til laksafóður.

Alt gott um tað, men tað eru virkir á landi, sum vilja framleiða svartkjaftin til matna. Proteinini í svartkjafti kunnu eisini brúkast til m.a. kostískoyti. Virkini, sum ynskja at virðisøkja svartkjaftin, hava tó trupult við at sleppa fram at tilfeinginum. Hví so er, eru ymsar meiningar um, men ofta verður ført fram, at vit hugsa ov nógv í tonsum og ov lítið í krónum.

Tað er ikki tonsum, vit liva av, men krónum. Fer tað at eydnast okkum at gagnnýta svartkjaftin til matna og hágóðskuvørur, so kunnu vit fleirfalda avreiðingarvirðið til gagns fyri fiskimannin, vinnuna og samfelagið í sínari heild. Tað eru uttan iva fleiri møguleikar at skunda undir hesa mannagongdina. Ein av møguleikunum kundi verið at álagt skipunum, at ein partur av svartkjaftinum skal landast til matna.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 26. august 2022

Aksel V. Johannesen